

## Skúlin á Giljanesi

hevur verið nógv frammi í fjølmiðlunum, eftir at soppavøkstur varð staðfestur her. Bygdaráðið hevur samtykt at fara undir eina tilgongd til bygging av nýggjum skúla. Treytin fyri hesum er, at kommunan kann røkja aðrar skyldur, og at fíggjarmálaráðið góðkennir at lániskuldin fer upp um eina álíkning. Sum víst verður á aðrastaðni í blaðnum er skúlin á Giljanesi í slíkum standi, at tað verður mett rættari at byggja nýggjan skúla, heldur enn at brúkar stórar upphæddir til umvæling.

# Eisini OK

Tað var ikki nógv positivt, ið næmingarnir høvdu at siga um teirra skúla. Hetta kann neyvan undra nakran.

Men er so einki gott við skúlanum?

- Jú, sigur ein teirra. - Vit hava ikki so nógv heimaarbeiði fyri.

Ein annar teirra heldur tað hinvegin vera sera positivt, at tey hava nógv heimaarbeiði fyri.

Tey eru kortini øll samd um eitt einstakt evni: - Tað er ordiliga cool at ítróttarhøllin er opin í fríkorterinum.

Tað hoyrir eisini við til positiva ummælið, at næmingarnir, ið koma úr Sandavági, Miðvági og Vatnsoyrum eru væl samansjóðaðir, m.a. eftir túrin í Turkalandi á heysti í fjør.

- Vit læra hóast alt eisini eitt sindur í skúlanum.



**BRÓT NIÐUR**

*- Tað er bara eitt at gera. Brót skúlan niður. Gev okkum ein ordiligan skúla, uttan blámusopp, siga næmingarnir í 9. flokki í Giljanes skúla*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

roti, sigur ein teirra.

Og hini nikka samtykkjandi.

### Heldur til Sørvágs

Bæði í skúlanum, úti millum vinirnar og heima við hús verður skúlamálið sum vera man umrøtt.

Tað er víst ikki ov nógv sagt, at teir átta næmingarnir í 9. flokki hava eina einstaka hugsan um skúlamálið: - Bygg ein nýggjan skúla sum lýkur dagsins krøv.

Týdningarmesta orsøkin til hetta er blámusoppurin, men eisini tað, at tey viðhvørt mugu flyta oman í skúrin, sum er settur upp í skúlagarðinum. Tað er eisini onnur innandura viðurskifti, sum tey als ikki eru nøgd við.

Tey eru í øllum førum samd um, at skúlin á Giljanesi hevur havt sínar bestu dagar. Hann er ikki nóg góður til tey.

Kanska orðini hjá eina næminginum siga alt um støðuna:

- Slapp eg at velja millum skúlan á Giljanesi og tann í Sørvági, - ja, so hevði eg valt skúlan í Sørvági.

snorri@sosialurin.fo

# 258 næmingar

Í Miðvágs-Sandavágs skúla ganga 258 næmingar hetta skúlaárið. Ein framrokning sum skúlin hevur gjørt vísa, at talið av næmingum fer at vaksa tey komandi árini. Talið má takast við tí fyrivarni, at øll í 9. flokki halda fram í 10. flokki.

Sambært framrokningini verða sostatt 282 næmingar í skúlanum, 307 árið eftir og skúlaárið 2015/16 verða eftir ætlan 313 næmingar við skúlan.